TJÓÐVELDI

# Fakligir førleikar, skapanarevni og trivnaður hond í hond í fólkaskúlanum

## Útbúgvingin hjá lærarum

*Ætlanin er at læraraútbúgvingin verður umskipað til eina bachelor útbúgving. Ynskið hjá Føroya Lærarafelag er, at ein 5 ára kandidatútbúgving verður viðtikin beinanvegin og fer í gongd í 2009 – við samsvarandi lønarlagi sum aðrar kandidatútbúgvingar. Hvør er tykkara støða til hetta?*

Tjóðveldi er púra samt við Lærarafelagið um at læraraútbúgvingin skal skipast sum ein 5 ára kandidatútbúgving; flokkurin eisini hetta fram undir fyrstu viðgerð av uppskotinum um at broyta Fróðskaparsetrið. Við eini 5 ára kandidatútbúgving verður grundarlag skapt undir einum hægri fakligum støði í fólkaskúlanum, lærarar verða uppstigaðir og fáa harvið grundarlag fyri einum hægri lønarlagi og tað fer at føra við sær eina hægri virðing fyri lærarayrkinum.

## Býtið millum land og kommunu

*Føroya Lærarafelag saknar eina greiða útmelding um, hvat politisku flokkarnir vilja, tá ið tað snýr seg um býtið millum land og kommunu á skúlaøkinum.*

*Ganga tit inn fyri 6-7 tvingaðum kommunalum økjum, og at hesi økini umsita fólkaskúlan fult og heilt?*

Vit taka fult og heilt undir við at skipa Føroyar í 5 til 7 sterkar kommunalar eindir og at hesar fáa fulla ábyrgd av fólkaskúlanum. Skúlin verður tá sjálvandi skipaður undir eini rammulóg, sum tryggjar raksturin og innihaldið í skúlanum.

*Hvørja tíðaráseting seta tit á, at hetta skal verða framt?*

Tíðaráseting fyri kommunusamanlegging er í seinasta lagi 2010 og fyri at skúlin so kann leggjast út eiga ikki at ganga meiri enn tvey ár, altso 2012.

## Stórir og smáir skúlar

*Í Føroyum eru 57 fólkaskúlar, nógvir teirra eru smáir. Hvør er tykkara støða til skúlastøddir?*

Smærru skúlarnir hava ringar umstøður at bjóða næmingunum spennandi og avbjóðandi uppgávur, og tá kanningar vísa, at trivnaðurin kanska ikki er eins góður í smáum skúlum, halda vit tað vera rætt at leggja skúlar saman, men tað má vera einstaka samanlagda kommunan sum sjálv skipar hesi viðurskifti.

*Eftir hvørjum leisti eiga skúlar at verða samanlagdir, um so er, at teir skulu tað?*

Kommunan velur sjálv leistin í tøttum samstarvi við skúlastýrið og foreldur.

*Vilja tit stuðla kommunum í sambandi við bygging av nýggjum skúlum, ið eru úrslit av samanleggingum?*

Verandi skipan er góð og greið har kommunurnar rinda fyri skúlabygging.

*Tá ið talan er um samanlegging – eru tit sinnað at varðveita verandi tímajáttan, hóast skúlar verða lagdir niður, hetta so at fleiri lærarar vera til t.d. yngru árgangirnar?*

Tímajáttanin eigur at vera varðveitt, men tað er skúlin sjálvur sum ger av, hvussu tímarnir vera nýttir, undir teimum minstukrøvum, sum eru fyriskipað.

*Ella hugsa tit samanlegging bara við sparing fyri eyga?*

Samanlegging av skúlum er ein rationalisering av rakstrinum av skúlaverkinum og ein háttur at lyfta fakliga støðið og bøta um trivnaðin hjá lærarum og næmingum.

## Næmingar við serligum tørvi

*Fólkaskúlalógin ásetir, at fólkaskúlin er fyri øll – sama hvønn tørv næmingurin hevur. Veruleikin er, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki fáa nøktandi undirvísing. Hvussu skipa vit fyri, at tey veiku í okkara skúla, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa eitt nøktandi skúlatilboð?*

Skúlin eigur at bjóða fakliga veikum næmingum serligan stuðul, eitt nú í hjálpiklassum og við stuðli inni í flokkinum, sum vit kenna tað her heima og aðrastaðni. Til teir atferðartruplu næmingarnar eiga heilt serlig tiltøk at setast í verk. Bæði við at serstovur verða gjørdar kring landið, ið taka sær av hesum næmingum, men eisini við at einstaki skúlin fær høvi at skipa øðrvísi skúlatilboð fyri einstaklingin, sum hóska til júst tann næmingin, eisini í samstarvi við vinnulív, kommunur og almennar stovnar annars.

*Eiga næmingar at verða býttir upp eftir førleika, evnum, atferð ella øðrum?*

Vit skulu framvegis halda fast um grundarlagið undir fólkaskúlanum, har fólkaskúlin er ein eindarskúli, sum merkir at tað skal vera rúm fyri øllum. Hesin tankin forðar ikki fyri at skipa serlig tilboð fyri næmingum, sum eru fakliga veikir ella atferðartruplir.

*Um ja, hvat fyri tilboð eiga teir at fáa? ella eigur skúlin at halda fast við verandi skipan, har næmingar ikki verða flokkaðir eftir fakligum evnum, atferð o. ø.?*

Ja, sum nevnt er hetta grundtankin undir skúlanum, og hann skal varðveitast.

*Hvussu tryggja vit so, at allir næmingar fáa eitt nøktandi tilboð?*

Øllum næmingum verður tryggjað nøktandi tilboð við alla tíðina at útbyggja ta næmingalagaðu undirvísingina. Næmingalagaða undirvísingin hevur sum mál, at allir næmingar fáa hóskandi avbjóðingar, so at bæði næmingar, sum eru fakliga sterkir, næmingar sum eru miðalsterkir og teir fakliga veiku næmingarnir fáa høvi at mennast og fáa betri fakligan førleika. Fakligur førleiki skal her skiljast í breiðastu merking, sum bæði handaligur, andaligur, sosialur og kropsligur førleiki. Tað er heila menniskjað, sum skal hava avbjóðingar og skal kunna mennast á øllum sínum økjum.

---

MIÐFLOKKURIN

# Atlitið til næmingin raðfestast fram um stirvnar mannagongdir og vanar!

## Útbúgvingin hjá lærarum

*Ætlanin er at læraraútbúgvingin verður umskipað til eina bachelor útbúgving. Ynskið hjá Føroya Lærarafelag er, at ein 5 ára kandidatútbúgving verður viðtikin beinanvegin og fer í gongd í 2009 – við samsvarandi lønarlagi sum aðrar kandidatútbúgvingar. Hvør er tykkara støða til hetta?*

Uppgávan samfelagið leggur á herðar lærarans er ovurhonds og týdningarmikil, og uttan drál eiga vit at uppraðfesta útbúgvingina til eina 5 ára kanditatútbúgving. Miðflokkurin er samdur við tí leisti, Føroya Lærarafelag hevur lagt á økinum.

## Býtið millum land og kommunu

*Føroya Lærarafelag saknar eina greiða útmelding um, hvat politisku flokkarnir vilja, tá ið tað snýr seg um býtið millum land og kommunu á skúlaøkinum.*

*Ganga tit inn fyri 6-7 tvingaðum kommunalum økjum, og at hesi økini umsita fólkaskúlan fult og heilt?*

Størri kommunal øki eru neyðug, men at tvinga kommunur nú, júst sum tær sjálvar tykjast finna fram til hetta, meta vit ikki er neyðugt. Tíðin hevur higartil megnað at fáa glið á komm unusamanleggingarnar, og vænta vit, at hesin verður til fulnar loystur í komandi valskeiði.

## Stórir og smáir skúlar

*Í Føroyum eru 57 fólkaskúlar, nógvir teirra eru smáir.*

*Hvør er tykkara støða til skúlastøddir?*

Tað er neyðugt at fylgja við og tryggja, at børn á smáu skúlunum veruliga fáa eina dagførda og nútímans frálæru. Um mett verður at samanlegging av skúlum er neyðug, er *sjálvboðin* samanlegging í størri eindir ynskjandi. Um ikki, eigur hetta at verða gjørt við lóg.

Sum er, eru smærru kommunurnar ikki førar fyri at geva eitt tíðarhóskandi skúlatilboð á ávísum økjum, og fáa tær jú longu nú hjálp frá størru grannakommunum.

*Eftir hvørjum leisti eiga skúlar at verða samanlagdir, um so er, at teir skulu tað? Ella vilja tit stuðla kommunum í sambandi við bygging av nýggjum skúlum, ið eru úrslit av samanleggingum?*

Einki er í vegin fyri at tað almenna stuðlar skúlabygging, har hetta er neyðugt (barnið og útbúgving tess má verða fremsta mál). Og krevst økt tímatal, eigur tað at verða játtað. Ein samanlegging, 'bara við sparing fyri eyga' er høpis- og ábyrgdarleys.

## Næmingar við serligum tørvi

*Fólkaskúlalógin ásetir, at fólkaskúlin er fyri øll – sama hvønn tørv næmingurin hevur. Veruleikin er, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki fáa nøktandi undirvísing.*

*Hvussu skipa vit fyri, at tey veiku í okkara skúla, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa eitt nøktandi skúlatilboð?*

Miðflokkurin metir, at ein skipan kann evnast til, ið tekur atlit til bæði tann stinna og tann minna stinna næmingin. Vit mugu burtur frá einari undirvísing, har næmingurin við góðum evnum verður misrøktur og ikki sleppur víðari, tí orkan bert røkkur til tann *veika*. Hetta krevur uppraðfesting, bæði fíggjarliga og við lærarum, serlærarum, pedagogum og øðrum serútbúnum, sum eiga at fáa léttari atgongd um skúlans gátt.